Dráttur — Mjølnir 2-3 (25-16, 16-25, 22-25, 25-20, 9-15)

# Gull-roykur í Klaksvík

**Kvinnuliðið hjá Mjølnir vann oddabrakið á Giljanesi, og standa nú við øllum trumfunum í hondini til at vinna enn eitt meistaraheitið til Klaksvíkar**

FLOGBÓLTUR, KVINNUR

Tað var hugaligt at leita sær í høllina á Giljanesi sunnudagin til dystin millum oddaliðini í meistaradeildini Drátt og Mjølnir og síggja mongu áskoðararnar, sum vóru komnir til dystin. Ein viðurkenning av, at Dráttur seinastu árini hevur gjørt eitt gott arbeiði innan flogbólt í Vágun. Ikki bert fólk úr Miðvági og Sandavági var á staðnum, men eisini fólk úr Sørvági.

## Landsliðsevni

Og stemningur var í høllini, tá Dráttur legði fyri við at vinna fyrsta settið. Alt riggaði, og klaksvíkingarnir funnu ikki seg sjálvar. Álopsspælið var gott, og tað var í heilum at Dráttur-leikararnir Helga Nordendal og Sólgerð Henriksen buldraðu bóltin í gólvið á miðjuni. Ja, tær vóru landsliðsevni, nú skjótt verður farið til Oyggjaleikir.

Dráttur kom skjótt framum í fyrsta settinum 12-5, og hesin munurin var alt settið. Hetta sá út til at órógva Mjølnir-liðið so mikið nógv, at tær ongantíð fingu sítt eyðkenda spæl at koyra. Og so løgið tað ljóðar, gloymdu tær eisini at taka time-out. Men ein greiður sigur til Drátt við muninum 25-16.

## Tove Riksfjord goðar servur

So stórur munur var á fyrsta setti, at roknað var við, at dysturin var avgjørdur. Men hetta vildi Tove Riksfjord annarleiðis. Við sera góðum servum servaði hon frá 2 upp á 9 stig, og Dráttur hevði trupulleikar at vinna bóltin aftur, sjálvt um tær høvdu Marinu Popovic frammi við netið, men hon fekk heldur ikki tær bestu hevingarnar frá Torgun Jónsdóttir hesa løtuna, eisini tí móttøkunar vóru vánaligar..

Og í hesu støðuni byrjaði spælið hjá Drátti so spakuliga at falla sundur. Farið var yvir til at lobba og koyra bóltin yvirum við fingraslagnum, og tá er deyðin vísur, tá ein leikar ímóti Mjølni. Tí her hava tær sína styrki, serliga Margit Joensen og Vera Larsen.

Mjølnir vann settið 25-17 og Dráttur-liðið var í upploysn.

## Javnt í triðja og fjórða

Í triðja setti kom Dráttur best frá byrjan og var frammanfyri 8-4, men so fylgdust liðini restina av settinum, og støðan var 18-18 og 20-20. Men við royndu Marjun Kalsø á odda, eydnaðist tað til seinast Mjølni at vinna 25-22. Aftur hetta settið kundi Dráttur havt fingið meira burtur úr, um tær høvdu sligið meira til bóltin. Á Mjølnirliðinum leikti Margit Joensen saman við Berit Norðoy væl frammi við netið hetta settið, eins og ein til tíðir eisini legði til merkis Annu Vilhelm, tá hon royndi seg við onkrum backspike.


Gullfepurin er av álvara farin at gera um seg í Klaksvík, nú tað røkist fyri, at flogbóltskvinnurnar skulu endurvinna gullmerkini

## Herborg á Mýruni inn

Í fjórða setti valdi Dráttur at seta Herborg á Mýruni inn fyri Elisabet Rasmussen, sum ikki hevði ein sínum bestu døgum.

Og Herborg kom væl frá byrjan. Ein kann siga, at hon var við til at leggja grund til sigurin hetta settið, tí servur hennara ørkymlaðu Mjølnir-liðið almikið. Herborg servaði frá 4 og upp á 11, og hetta gjørdist ov nógv hjá Mjølni at heinta inn aftur. Dráttur vann settið 25-20.

## Nervarnir veikari

Seinasta settið var spennandi í byrjanini, tá liðini fylgdust, men við støðuna 8-6, tá skift var síðu, og Dráttur aftur misti ein bólt og kom afturum 9-6, tá sást, at tær mistu mótið. Og tað má ein ikki gera ímóti vælleikandi Mjølnir-liðnum. Mjølnir vann uttan trupulleikar 15-6 og harvið dystin 3-2 og liggur tískil best fyri at fáa til høldar gull-heiðursmerkini.

## Niðurstøða

Samanumtikið kann sigast, at Mjølnir vann, tí tær enn einaferð prógvaðu, at tær høvdu eitt betri grundspæl, men um Dráttur fær betri skil á móttøkunum, so skal ein ikki eina løtu ivast í, at tær hava betru áleypararnar. Eisini skal hevarin ikki vera bangin fyri, at hon ikki býtir bóltarnar javnt ímillum hesar áleyparar, tí bóltarnir mugu hevast har teir vera vunnir.

Liðini møtast aftur um 14 dagar í Klaksvík til landskappingardyst, men eisini 17. februar í steypafinaluni. Og tá er ikki pláss til nervar.

Fleyr — TB 0-3, (17-25, 12 - 25, 9-25)

# TB aftur ein sigur


TB vann greiðan sigur á Fleyr, og unga suðuroyðarliðið heldur sostatt fast um triðja plássið, sum tær hava átt meginpartin av kappingarárinum

Mynd: Álvur Haraldsen

**Fleyr slapp ongantíð at spæla nakran veruligan leiklut sunnudagin, annað enn at vísa, at tær enn eru langt frá støðinum, sum tær vanliga hava hildið sær á**

FLOGBÓLTUR, KVINNUR

Ein avsmurningur til havnarkvinnurnar. Tað var einki at gera, tá TB leygardagin vant burturúr Fleyr, og settúrslitini tala eisini fyri seg.

TB-liðið, sum í endaspælinum bert hevur leikt ímóti oddaliðunum Mjølni og Drátti, fekk hetta vikuskiftið eitt lættari mótstøðulið. Og tær nýttu møguleikan. Liðið hevur seinastu tiðina fingið meira javnan leik uttan teir stóru psersónligu feilirnar, og hetta gav úrslit ímóti Fleyr.

## Vánaliga móttøku

Fleyr-liðið hevði trupulleikar allan dystin við móttøkunum, og einki tykist at hanga saman í spælinum, hóast tær til tíðir royndu sítt besta. Hvørja ferð tikið var ímóti servunum frá TB, mátti Fleyr-hevarin Mariann Øster so at siga runt allan vøllin, fyri at fáa fatur á bóltinum. Og hetta sást eisini á hevingunum, sum tískil ikki gjørdust serliga góðar.

Sum nevnt omanfyri, er TB-liðið vorðið betri og betri í hesum kappingarárinum — tað tær mangla, er ein persónur sum kann avgera bóltarnar, hvørja ferð tað er neyðugt. So høvdu tær eisini klára seg ímóti Drátti og Mjølni.

Sigurin í Havn upp á 3-0 var fult uppiborin. TB liggur nú á 5-plassi, men tá kappingin endar, kann roknast við, at tær fáa bronsuna, um tær halda áfram við sama spælistíli.



Fleyr - Fram 1 — 3 (25 —18, 13 — 25, 22 – 25, 17 - 25)

# Tannleyst í Havn

**Stríðið um Havnina í flogbólti leygardagin, gjørdist ikki ein av teimum bestu dystunum og náddi ongantíð upp á tað støði, sum hesi liðini hava leikt á fyrr.**

FLOGBÓLTUR, MENN

Samanumtikið vóru gjørdir ov nógvir persónligir feilir, og til tíðir kundi tað sæð út til, at tað liðið sum vann, var tað liðið, sum gjørdi minst feilir, og ikki tí at tað endiliga hevði so nógv góð álop ella blokkar.

## Fleyr best frá byrjan

Fyrsta settið gekk javnt á fram til støðuna 18 — 15 til Fleyr, tá Fram tók eitt time-out, men eftir hetta fekk Fram bert tvey stig, og Fleyr vísti hesa løtuna gott spæl, og við hjálp av nógvum persónligum feilum, — smassj út av vøllinum - megnaði Fleyr at vinna settið uppiborið 25-18.

Men so støðgaði alt upp hjá Fleyr í tí næsta settinum. Liðini fylgdust upp á 4-4, tá Ragnar Petersen fór at serva. Og hann servaði heilar 5 servir á rað, soleiðis at støðan gjørdist 8-4 og løtu seinni servaði Pasco 6 bóltar á rað, soleiðis at Fram kom framum 17-9. Pasco skifti ímillum stuttar og langar servur, og hetta sá út til at órógva Fleyr-liðið í móttøkuni, sum henda dagin ikki hevði Jan Hentze við, vegna skaða. Fleyr hevði fleiri møguleikar at vinna nakrar bóltar hesar løtuna, men alt var misbrúkt. Rúni Weihe frá Fram hevði tó eisini okkurt gott kombinatiónssmassj á miðjuni, og hetta var kanska einasta ljóspunkt í øllum dystinum.

Fram vann settið uppiborið 25-13.

## Og Fram helt fram

Triðja settið var javnari. Fram kom á odda 20-17, men Fleyr fekk kempað seg upp á 20-20, men so var nóg mikið. Fram vann trý stig á rað og kom framum 23-21, men fleyr kom upp á 22-23, men tapti so 25-22.

Fjórða og seinasta settið var eisini javnt í byrjanini, og støðan var eitt skifti 12-13, men so fekk Fram tvey góð servupartí, og legði seg klárt á odda og vann settið 25-17 og harvið dystin 3-1.

Fleyrliðið fekk ongantíð miðálopið at virka í hesum dystinum, og sama kann sigast um Fram. Tað er ov ofta, at miðáleypararnir trekkja ov tætt til netið, og tá kann ein ikki rokna við, at tað vera tey bestu smassjuni, ein fær burturúr.

Men samanumtikið ikki ein dystur, sum ein fer at minnast leingi vegna tað góða spælið, men heldur tí at tað vóru nakrir áskoðarar til dystin. Og tað er ein framgongd.


Brakið í Havn gjørdist ongantíð tann stóra upplivingin, og tá alt kom til alt hevði Fram vunnið ein hampuliga tryggan sigur á grannunum

Mynd: Álvur Haraldsen

# Aðrir dystir

FLOGBÓLTUR, KVINNUR OG MENN

Steypavinnararnir í Sørvági

Oddaliðið hjá monnunum, Mjølnir, var leygardagin í Sørvági og leikti ímóti SÍ. Roknast kundi kanska við, at Mjølnir fór at fáa trupulleikar, tí at leikandi venjarin Borko lá sjúkur, men hetta sýndist ikki at bila.

Mjølnir vann dystin 3-0 við settmununum 17-25, 15-25 og 19-25. Besti leikari hjá SÍ var Suni Hansen, meðan allir hjá Mjølni høvdu ein javnan dag.

Mjølnir liggur framvegis á odda hjá monnunum, men komandi vikuskifti kann gerast hart, tí leygardagin skal liðið til Havnar at leika ímóti Fleyr, og longu sunnudagin verður aftur leikt ímóti hinum oddaliðnum ÍF. Hesin dysturin verður á Kambsdali.

## ÍF kvinnunar vunnu — á triðja pláss

Kvinnunar úr Fuglafirði vunnu leygardagin ein uppibornan sigur á Fossánesi. Og sigurin var ikki til at taka feil av. Tær vundu burtur úr norðoyingunum og vunnu 3-0. Settini endaðu 25-10, 25-9 og 25-19. Sostatt megnaði Fossánes ikki at halda áfram við spælinum, sum tær vístu, tá tær vunnu eitt sett ímóti Fleyr fyri 2 vikum síðani.

ÍF hevur nú vunnið seg fram á triðja plássið við sama stigatali sum Fleyr. Men um TB heldur áfram við sínum góða leiki, verður tað ringt hjá fuglfjarðarkvinnum at vinna bronsuplássið.

## Støðan, Meistaradeild Menn

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| Mjølnir | 10 | 9 | 1 | 29 | 9 | 20 | 11 |
| ÍF | 10 | 7 | 3 | 24 | 13 | 11 | 9 |
| Fram | 11 | 6 | 5 | 24 | 20 | 4 | 8 |
| Fleyr | 11 | 5 | 6 | 19 | 21 | -2 | 6 |
| SÍ | 12 | 0 | 12 | 3 | 36 | -33 | 0 |

## Støðan, Meistaradeild Kvinnur

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| Dráttur | 13 | 12 | 1 | 38 | 8 | 30 | 15 |
| Mjølnir | 12 | 11 | 1 | 34 | 7 | 27 | 13 |
| Fleyr | 14 | 6 | 8 | 20 | 30 | -10 | 7 |
| TB | 13 | 5 | 8 | 25 | 25 | 0 | 6 |
| ÍF | 12 | 4 | 8 | 15 | 27 | -12 | 5 |
| Fossánes | 12 | 0 | 12 | 1 | 36 | -35 | 0 |

## Støðan, 1. Deild Menn

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| ÍF | 7 | 7 | 0 | 21 | 2 | 19 | 14 |
| Nøvan | 8 | 5 | 3 | 16 | 13 | 3 | 10 |
| Mjølnir b | 7 | 3 | 4 | 14 | 15 | -1 | 6 |
| Mjølnir a | 9 | 4 | 5 | 17 | 19 | -2 | 8 |
| SÍ | 8 | 3 | 5 | 13 | 18 | -5 | 6 |
| Fleyr | 8 | 4 | 4 | 15 | 18 | -3 | 8 |
| NFL | 7 | 1 | 6 | 8 | 19 | -11 | 2 |

## Støðan, 1. Deild Kvinnur

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| Fleyr | 7 | 6 | 1 | 20 | 7 | 13 | 12 |
| Nøvan | 6 | 4 | 2 | 14 | 9 | 5 | 8 |
| Dráttur | 6 | 3 | 3 | 12 | 13 | -1 | 6 |
| KÍF | 7 | 3 | 4 | 13 | 16 | -3 | 6 |
| SÍ | 6 | 2 | 4 | 10 | 12 | -2 | 4 |
| Mjølnir | 6 | 1 | 5 | 4 | 16 | -12 | 2 |

## Støðan, 2. Deild Menn

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| Nøvan | 4 | 3 | 1 | 11 | 7 | 4 | 6 |
| SÍ | 5 | 2 | 3 | 8 | 6 | -2 | 4 |
| ÍF | 5 | 2 | 3 | 9 | 11 | -2 | 4 |

## Støðan, 2. Deild Kvinnur

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| TB | 9 | 9 | 0 | 27 | 1 | 26 | 18 |
| Mjølnir a | 8 | 7 | 1 | 21 | 6 | 15 | 14 |
| KÍF | 10 | 8 | 2 | 26 | 11 | 15 | 16 |
| Fleyr | 9 | 5 | 4 | 19 | 16 | 3 | 10 |
| Nøvan | 9 | 3 | 5 | 16 | 16 | 0 | 8 |
| ÍF | 9 | 3 | 6 | 12 | 18 | -6 | 6 |
| SÍ | 10 | 1 | 9 | 4 | 27 | -23 | 2 |
| Fossánes | 10 | 0 | 10 | 0 | 30 | -30 | 0 |

## Støðan, Dreingir 16

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| SÍ | 6 | 5 | 1 | 15 | 5 | 10 | 10 |
| Fleyr | 7 | 5 | 2 | 17 | 10 | 7 | 10 |
| TB | 5 | 1 | 4 | 5 | 12 | -7 | 2 |
| ÍF | 6 | 1 | 5 | 5 | 15 | -10 | 2 |

## Støðan, Gentur 16

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| KÍF | 6 | 6 | 0 | 18 | 1 | 17 | 12 |
| TB | 6 | 5 | 1 | 17 | 3 | 14 | 10 |
| Dráttur a | 7 | 5 | 2 | 16 | 8 | 8 | 10 |
| Fleyr | 7 | 2 | 5 | 6 | 17 | -11 | 4 |
| Dráttur b | 5 | 0 | 5 | 4 | 15 | -11 | 0 |
| ÍF | 7 | 1 | 6 | 3 | 20 | -17 | 2 |

## Støðan, 2. Deild Kvinnur

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| TB | 8 | 8 | 0 | 24 | 1 | 23 | 16 |
| Mjølnir a | 8 | 7 | 1 | 21 | 6 | 15 | 14 |
| KÍF | 9 | 7 | 2 | 23 | 9 | 14 | 14 |
| Fleyr | 8 | 5 | 3 | 17 | 13 | 4 | 10 |
| Nøvan | 7 | 2 | 5 | 10 | 16 | -6 | 4 |
| ÍF | 8 | 2 | 6 | 9 | 18 | -9 | 4 |
| SÍ | 8 | 1 | 7 | 4 | 21 | -17 | 2 |
| Fossánes | 8 | 0 | 8 | 0 | 24 | -24 | 0 |

## Støðan, Dreingir 16

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| SÍ | 5 | 4 | 1 | 12 | 5 | 7 | 8 |
| Fleyr | 6 | 4 | 2 | 14 | 8 | 6 | 8 |
| TB | 4 | 1 | 3 | 3 | 9 | -6 | 2 |
| ÍF | 5 | 1 | 4 | 5 | 12 | -7 | 2 |

## Støðan, Gentur 16

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| KÍF | 5 | 5 | 0 | 15 | 1 | 14 | 10 |
| Dráttur a | 7 | 5 | 2 | 16 | 8 | 8 | 10 |
| TB | 5 | 4 | 1 | 14 | 3 | 11 | 8 |
| Fleyr | 6 | 2 | 4 | 6 | 14 | -8 | 4 |
| Dráttur b | 4 | 0 | 4 | 2 | 12 | -10 | 0 |
| ÍF | 5 | 0 | 5 | 0 | 15 | -15 | 0 |